VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Hann minkar vindin niður í lot av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin milllum 2 og 5 stig.



Veðrið hósdagin:
Fleyr til gul av útnyrðingi, seinnapartin upp í andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av norði og ælingur, men sunnudagin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 9 stig.

Trio á ferð

Tónleikatrio við einum føroyskum tónleikara er í hesum døgum á konsertferð í Norðuratlantshavi

TÓNLEIKUR
tíðindaskriv

ISFO TRIO, sum er Sigurður Flosason, saxofon, Kjartan Valdemarsson, piano og Edvard Nyholm Debess, kontrabass ferðast í hesum døgum í Norðuratlantshavi. Í bólkinum eru tveir íslendingar og ein føroyingur. Teir spæla løg, sum teir sjálvir hava skrivað.

Norðurlandahúsið í Føroyum stuðlar ferðini.

Fyrsta tónleikaferðin gongur til Hetlands, har konsert verður í Lerwick Town Hall týsdagin 28. oktober. Síðani liggur leiðin til Føroya, har konsert verður í Runavíkar Skúla hósdagin 30. oktober. Triðja og seinasta konsertin í hesum umfari verður á Reykjavíkar Jazzfestivali, har konsert verður í NASA í Reykjavík 5. november.

Kendur tónleikari

Saxofonleikarin Sigurður Flosason er kendur maður í Íslandi og mann verða mettur at vera fremsti saxofonleikari teirra. Hann hevur frá ungum árum spælt, lisið og tikið prógv á Konservatoriinum í Reykjavík, umframt at hann síðani hevur lisið jazzspæl í USA, og verið eitt ár í læra hjá George Coleman og Dave Liebman í New York. Sigurður Flosason er eisini mest umbidni íslendski jazzsolistur uttanlanda og hevur spælt nógvastaðni runt í Norðurlondum og Europa.

Á fløguøkinum er Sigurður virkin maður, og hann er við sum tónleikari á mongum útgávum.

Sjálvur hevur hann seinastu árini givið út fløgur við egnari kvartet og tvær sera væl umtóktar fløgur saman við orgulspælaranum Gunnar Gunnarsson, har teir spæla egnar útgávur av íslendskum sálmum.

Lisið í Boston

Pianoleikarin Kjartan Valdemarsson hevur eisini lisið klassiskan tónleik í Íslandi, áðrenn hann legði leiðina til kenda Berklee College of Music í Boston. Eftir prótvøku har kom hann aftur til Íslands, har hann síðani hevur verið eitt fremsta væl tá tað snýr seg um íslendskar klaverleikarar.

Kjartan Valdemarsson er víttfevnandi tónleikari og spælir hann alt, heilt frá klassiskum, yvir musical til rocktónleik. Men mest kendur mann hann vera fyri sítt originala jazzspæl og er hann ein nógv brúktur til konsert - og fløguframførslu.

Føroyska ískoytið

Basspælarin Edvard Nyholm Debess er kendur bassleikari í Føroyum, og hevur hann eisini seinastu árini gjørt meira og meira vart við seg úti í Norðurlondum. Hann samstarvar og hevur spælt við norðurlendskum tónleikarum úr Íslandi, Finlandi, Danmark, Svøríki, Grønlandi.

Eins og Sigurður og Kjartan, er Edvard eisini klassiskt útbúgvin tónleikari, men hevur í longri skeið leita sær jazzfrálæru frá frægum fólki, so sum Niels Henning Ørsted Pedersen í Danmark og Marc Johnson í New York, umframt í styttri tíðarskeið at hava fingið frálæru frá t.d. Larry Grenadier (USA) og Jens Jefsen (DK).

Edvard er kendur sum ein víttfevnandi bassleikari sum kann spæli í flestum høpum, tað verið seg klassiskt í Føroya Symfoniorkesturi, blues í Headache Blues Treo og country við Jens Lisberg.

Umframt at verða við á fleiri føroyskum fløgum hevur Edvard Nyholm Debess sjálvur givið út tvær fløgur í egnum navnið, nevniliga Debazz (TUTL 2000) og LØG (Landing Duck Records 2003)

Edvard hevur heimasíðu á: www.debazz.com

ISFO TRIO, sum ferðast í Norðuratlantshavi, eru frá vinstru saxofonleikarin Siðurður Flosason, passpælarin Edvard Nyholm Debess og pianoleikarin Kjartan Valdemarsson. Norðurlandahúsið stuðlar ferðini.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	8
Nuuk	10
Qaqortoq	12
Ammassalik	2
Saint John's	7
Halifax	6
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	5
Lerwick	4
Aberdeen	4
London	10
Tromsø	-1
Bergen	2
Oslo	--
Stokkhólm	3
Keypmannah.	5
Helsinki	-1
Moskva	4
Berlin	8
Warzawa	7
Kiev	11
Bukarest	11
Paris	9
Madrid	16
Róm	20
Malorca	22
Athen	--
Malta	25
Tunis	29
Beijing	20
New Dehli	29
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	26
New York	12
Miami	27
Los Angeles	26
Meksikobýur	17
Panama	--
La Paz	16
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	20

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt hátrýst, 1035 hPa. norðan fyri Ísland breiðir seg suður- og eystureftir. Eitt lágtrýst, 1011 hPa. yvir Norðsjónum grynnist.

Í dag:
Hátrrýstið, sum røkkur frá Íslandi til Suður-Noreg viknar nakað í eystara partinum, men gevur væntandi góðveður á okkara leiðum teir fyrstu dagarnar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 20/10 kl. 06⁰⁰– 21/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,4°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 20/10 kl. 06⁰⁰–21/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 41,7 mm

VESTFALLSKYRRINDI

14. oktober: Mánin longst frá jørðini
18. oktober: Seinna kvarter
25. oktober: Tendring
26. oktober: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
22. okt	04.39	17.01	03.39	16.01	03.54	16.16	06.39	19.01	07.39	20.01	02.54	15.16	01.54	14.16	04.54	17.16	05.54	18.16	04.24	16.46	05.39	18.01
23. okt	05.22	17.44	04.22	16.44	04.37	16.59	07.22	19.44	08.22	20.44	03.37	15.59	02.37	14.59	05.37	17.59	06.37	18.59	05.07	17.29	06.22	18.44
24. okt	06.06	18.28	05.06	17.28	05.21	17.43	08.06	20.28	09.06	21.28	04.21	16.43	03.21	15.43	06.21	18.43	07.21	19.43	05.51	18.13	07.06	19.28
25. okt	06.51	19.14	05.51	18.14	06.06	18.29	08.51	21.14	09.51	22.14	05.06	17.29	04.06	16.29	07.06	19.29	08.06	20.29	06.36	18.59	07.51	20.14

5 707265 100036 >